

Davissundið - í baksýninum - er eitt av fáu støðunum har ísurin ikki minkar. Mynd:EPA/MICHAEL STUDINGER / NASA

# Óvanliga lítið av ísi í Arktis í ár

**Jógvan Hugo Gardar**

22.03.2015 - 22:59

Oljan.fo

Tað er minni av ísi í Arktis í ár enn tað hevur verið nakað ársíðani tey fóru at gera mátingar av ísinum í 1979, sambørt amerikanska kava- og ísgranskingarstovninum (NSIDC).

Tá ísurin var uppá tað mesta í vetur, tann 25. februar, tá dekkaði hann 14,5 milliónir ferkilometrar, sambært NSIDC. Tað eru 1,1 milliónir ferkilometrar minni enn lægstu ísmongd higartil, ið var í 2011.

- Mátingarnar eru undir meðaltølunum í øllum økinum, burtursæð frá í Labradorsjónum og Davissundinum, skrivar granskingarstovnurin í einum tíðindaskrivi.

2014 var tað heitasta árið síðani 1800-talið, sambært heimsfelagsskapinum hjá veðurfrøðingum.

Sebastian Gerland, hjá norska Polarstovninum, sigur við tíðindastovunum NTB, at allar kanningar peika í eina ætt, og tað er at tað gerst heitari á jørð.

Í desember skulu leiðarar úr 200 londum hittast, har tey skulu finna út av um tey kunnu semjast um tiltøk sum forða fyri at jørðin heldur fram at gerast heitari.